# Hví tók tyrlan Torgerð og ikk



**– Tað tók mær langa tíð at koma yvir samvitskubiti. Hví skuldi tað vera hon, sum var so nógv yngri enn eg, sum fór. Slíkir tankar kunnu renna fram fyri meg enn, men tað er til at liva við í dag, sigur Jónbjørg Josephsen, sum sjálvonnur var til arbeiðis á Klaksvíkar sjúkrahúsi desembernáttina í 1992, tá tyrlan datt niður á Borðoyavík, og tveir av hennara starvsfeløgum lótu lív**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** – Tyrluvanlukkan fyllir nógv í mínum lívi enn tann dag í dag. Eg hevði ikki trúð tí, men eg hugsi rættiliga ofta um vanlukkuna og hatta kvøldið, vit vóru til arbeiðis. Serliga tá eg eri til arbeiðis á skurðdeildini, sigur Jónbjørg Josephsen.

Tað eru altíð tvær narkosusjúkrasystrar til arbeiðis á skurðdeildini, og hetta desemberkvøldið í 1992 vóru Jónbjørg og Torgerð til arbeiðis. Hetta var seinastu ferð tær arbeiddu saman, tí Torgerð var ein av teimum, sum var við tyrluni, tá hon datt niður.

Jónbjørg fekk øgiliga ringa samvitsku eftir vanlukkuna, men sigur, at í dag hevur hon megnað at leggja tað so mikið aftur um seg, at tað ikki er nakað, sum hon hugsar um til dagligt.

Jónbjørg sigur tó, at tað er ongin ivi um, at vanlukkan á Borðoyavík er tað svárasta, hon hevur verið úti fyri, síðani hon varð útlærd sum sjúkrasystir í 1965.

Vanlukkan er ikki í hennara tonkum hvønn dag longur, men tá hon fylgir líki út í kirkjugarðin úti í Grøv ella er har á leið, og tyrlan kemur, tá leita tankarnir altíð aftur til tey, ið lótu lív í vanlukkuni, sum neit so fast hjá so mongum menniskjum.

---

Nógv var at gera á skurðdeildini á Klaksvíkar sjúkrahúsi hendan desember dagin í 1992. Bert ein góð vika til jóla, og nógvar skurðviðgerðir vóru at fáa frá hondini. Jónbjørg og Torgerð høvdu verið til arbeiðis allan dagin. Nakað út á seinnapartin fingu tey ein vánaligan sjúkling inn á deildina. Tey arbeiddu upp á hann longi, men tað stóð ikki væl til.

Svenski yvirlæknin, sum tá arbeiddi í Klaksvík, gjørdi av at flyta sjúklingin til Landssjúkrahúsið, tí har var útgerðin betri til at arbeiða til tílíkum sjúklingum. Veðrið var gott, og gjørt varð av at flyta sjúklingin við tyrlu, tí ikki varð mett, at hann fór at klára túrin suður til Havnar við sjúkrabilinum.

Jónbjørg greiðir frá, at tað er vanligt, at tann sjúkrasysturin, sum hevur forvakt, fer við, tá sjúklingur skal flytast. Men tað er eisini vanligt, at sjúkrasystrarnar avtala sínámillum hvør skal fara við.

– Torgerð segði beinanvegin, at hon skuldi fara, um hon kundi hon sleppa frá at fara við sjúkrabilinum eina aðru ferð, tí hon gjørdist so øgiliga koyrisjúk, greiðir Jónbjørg stillisliga frá, meðan hon hyggur út.

Alt varð síðani riggað til, og tey fóru avstað við sjúklinginum. Torgerð, ein danskur lækni, sum bert var komin til Føroya at loysa av í 14 dagar og tríggir flogskiparar vóru við tyrluni.

---

Jónbjørg og hini, sum eftir vóru, ruddaðu so upp á skurðstovuni og tóku alt upp. Síðani fór Jónbjørg heim. Hon hevði ætlað sær at bíða eftir teimum, tí hon visti, at flogskipararnir á tyrluni plagdu at vera so elegantir at bjóða seg til at flúgva starvsfólk frá sjúkrahúsinum aftur til Klaksvíkar eftir ein sjúklingaflutning.

– Eg undraðist eitt sindur yvir, at tað tók so langa tíð, men gav mær kortini ikki meiri far um tað. So eg fór heim tá einaferð aftan á midnátt, greiðir Jónbjørg frá.

Um hálvgum tvey tíðina vaknaði hon av telefonini. Tað var tann kirurgiski yvirlæknin, sum boðaði frá, at tyrlan var dottin niður.

Alt fór at mala í høvdinum á Jónbjørg. Hon visti als ikki, hvat hon skuldi hugsa. Læknin, sum bar boðini, kendi ikki til sjúklingaflutningin, so hann var púra skelkaður. Og eina løtu valdaði kaos, tí ongin visti nakað at siga.

– Fyrst var tað ikki greitt um tað vóru tey ella um tey vóru komin til Havnar við sjúklinginum ella ikki, so alt var øgiliga óvist, og tað var ræðuligt, sigur hon.

Jónbjørg fór beint av songini og út á sjúkrahúsið. Tá hon kom hagar, var tað greitt, at sjúklingurin var komin á Landssjúkrahúsið í øllum góðum, og tyrlan var dottin niður á veg aftur til Klaksvíkar við læknanum, sjúkrasystrini og trimum flogskiparum.

---

Jónbjørg fekk samvitskubit av álvara. Hon bleiv við at hugsa um, hví tað skuldi verða hin sjúkrasysturin og ikki hon sjálv.

– Eg hevði nakað so forferdiliga ringa samvitsku, uttan tó at eg fekk gjørt nakað. Men tað tók rættiliga langa tíð at fáa tað upp á avstand, og eg hugsi um tað til tíðir enn, sigur hon syrgin á málinum og leggur afturat, at Torgerð var so nógv yngri, átti lítið barn og tí helt Jónbjørg, at tað hevði verið rættvísari, um tað var hon sjálv, sum var farin og ikki Torgerð. Eisini heldur hon, at tað at sjúklingurin seinni doyði gjørdi bara alt enn meira meiningsleyst.

– Serliga umstøðurnar hjá teimum avvarðandi hjá Torgerð, og tað at tað var eg, sum hevði forvaktina ta náttina, gjørdu sítt til, at eg hevði so ringa samvitsku, greiðir hon frá.

Við ringu samvitskuni fylgdu eisini ymiskar tankar. Til dømis plagdi Jónbjørg altíð at ynskja góðan túr, tá sjúklingar skulu flytast.

Tað stendur so sólarklárt fyri henni, at hon ikki gjørdi tað hasa einu ferðina, og tað hevur eisini fylt nógv í hennara tonkum, hóast tað neyvan hevði gjørt tann stóra munin. Jónbjørg heldur, at slíkir tankar hava eina megi av sær sjálvum undir tílíkum umstøðum.